

*Tinganes: Gamli býurin móti Eystaruvág soleiðis sum Arkitektaskúlin á Kunstakademinum í 1958 teknaði hann*



*– og so myndin soleiðis, sum býlingurin sær út í dag. Sum tað sæst, er flag komið á flestu tekjurnar hjá Landsstýrinum. Gamli Sjóvinnubankin hevur eisini fingið nýggja útsjónd – sum tykist meira fremmand saman við tí gamla*

## Tórshavnar býaratlas:

# Skulu skilja virðini hjá farnum ættarliðum

**Tórshavnar býaratlas er ein áhugaverdur bóklingur um býarsøgu og byggisið í Havn. Endamálið er at fáa okkum at geva ans, hvussu býrurin hevur fingið sítt skap, og at skilja tey virði, sum undanfarin ættarlið hava skapt og givið okkum**

Tað er sera áhugavert, at Tórshavnar Býráð hevur givið út Tórshavn býaratlas. Hetta er ein frágreiðing um og ein skráseting av varðveitingarverdum húsum og býarpartum í Havn. Øll hús, bygd eftir 1958, eru skrásett og leysliga varðveitingarmett.

Tá undirritaði fer at festa orð á blað um hetta evnið, so skal eg beinanvegin gera vart við, at eg eri rættiliga inhabilur í málinum, tí eg eigi eitt av teimum trimum privatu sethúsunum í býnum, sum eru mett í ovasta bólk av varðveitingarverdum húsum. Tí havi eg serligan áhuga í málinum – og eisini mín serliga alsk tann forna byggisiðin og hetta varðveitingararbeiðið sum heild.

Tórshavnar býráð hevur sum einasta kommuna í landinum víst serligan áhuga fyri varðveitslu av gamla byggisiðinum. Tann týdning, sum Gunnar Hoydal, fyrrverandi býararkitektur hevur havt í hesum máli er ikki at undirmeta. Longu fyri 35 árum síðani var ein serstøk byggisamtykt gjørd fyri Tinganes og gomlu Havnina, og er tað heilt víst beinleiðis orsøkin til, at gamla Havnin er so frægt varðveidd, sum hon er.

Tað hava verið nógvir tankar frammi um, hvat eigur at verða gjørt við gomlu Havnina. Fólk høvdu fyrr als ikki sama hugsunarhátt, sum flestu okkara hava í dag, at tað hevur stóran týdning, at vit væla um og varðveita tað gamla. Fyri nøkrum árum síðani var tað vanlig hugsan millum havnarfólk, at ”alt hatta gamla skramblið úti á Reyni átti at verið javnað við jørðina...”

### Øll hús hava sína søgu

Í býaratlasinum eru eini 20 býarumhvørvi og fleiri enn 1800 bygningar skrásett og lýst í tíðarskeiðnum 2006-2007. Greitt verður frá høvuðstættunum í arbeiðinum og gevur tað eina mynd av býnum og ymsu menningarskeiðunum. Eisini vísir atlasið á ítøkiligar bygningar og umhvørvi, sum eru verd at varðveita. Í stuttum verður greitt frá býarsøguni, um byggisið og um nakrar av teimum arkitektum, sum hava virkað í býnum.

– Endamálið er at fáa okkum at geva tí ans, hvussu býurin hevur fingið sítt skap, og at skilja tey virði, sum undanfarin ættarlið hava skapað og givið okkum, verður sagt í býaratlasinum.

Tá eg seinast í áttatiárunum umvældi hús míni, Nýggjustovu, í Gongini í Havn, tá var tað javnan, at eg kom á tal við fólk, sum hildu meg vera øran í høvdinum at fara í holt við slíkt. Tá eg greiddi frá, at húsini vóru friðað, og at serligar treytir vóru um varðveiting, so var niðurstøðan altíð, at hetta var púra ørt: Hví skal man bevara gamalt lort, heldur enn byggja nýtt? var vanliga fatanin.

Míni hús vórðu friðað seks ár frammanundan, at eg keypti tey. Hvør beinleiðis orsøkin var, veit eg ikki, men uttan iva er tað gjørt eftir tilmæli frá Fornminnissavninum. Húsini hava staðið lutvíst óbroytt í fleiri hundrað á, eins og sera áhugaverd søga knýtir seg at teimum. At býlingurin ”Heima í Havn”, sum er ovari parturin av Gongini, er av elstu búplássum í Havn, ivist eg ikki í, tí eingir vindar gera ónáðir her – einasta meteologiska órógvið er landsynningsregnið – og tí kann man varða seg fyri...

Men øll hús hava sína søgu – har summar kanska eru áhugaverdari enn aðrar. Tað hevur eisini týdning, at vit geva hesum ans.

### Átti at tikið fólkið upp á ráð

Í býaratlasinum verður fleiri ferðir nevnt hetta at fáa fáa fólk at geva ans. Tað er eisini mikið gott, men her kundi Tórshavnar kommuna tikið í egnan barm og í størri mun tikið íbúgvarnar í hesum økjunum við upp á ráð. Tað verður als ikki gjørt. Nevndir verða settar og útlendskir arkitektar settir á uppgávuna, men tann fólksligi parturin verður ikki raðfestur. Hvat halda t. d. fólkini úti á Reyni um alt hetta? Veit Tórshavnar býráð tað – ella er tað yvirhøvur áhugavert vita?

Tað er heilt víst, at hetta kundi gagnað málinum – og tað hevði uttan iva fingið fólk at givið arbeiðinum størri ans.

Bara eitt lítið kuriosum: Í býaraltasinum verður sagt, at tað kundi verið ein fyrimunur at býtt sundur øki til bilaferðslu og til fólk til gongu, og at ov nógv pláss í gamla býnum verður brúkt at seta bilar á. Hetta fær meg at hugsa um parkeringsviðurskiftini í miðbýnum.

Eg var við í einum bólki, sum skuldi arbeiða fyri at fáa skil á parkeringsviðurskiftunum í gomlu Havnini. Hetta var, tá Vøgg Guttesen, sáli, var býarverkfrøðingur fyri 10 árum síðani. Hann sýnti málinum stóran áhuga. Hann helt, at man átti at kunnað gjørt eina skipan fyri tey, sum búgva í miðbýnum. Men Vøgg doyði brádliga, og so kom stígur í málið.

Síðani hevur Tórshavnar kommuna ikki viljað hoyrt talan um hetta. Boðini eru greið, at tað ber ikki til at geva nøkrum sersømdir. Og tó...

Tað er líka tá tað snýr seg um løgmann og landsstýrismenn. Teir mugu sleppa at parkera so leingi teimum lystir úti í Tinganesi, halda býarverkfrøðingurin og Tórshavnar Býráð. Tey halda eisini, at tað er í lagi, at bilarnir hjá umsitingini hjá Tórshavnar Kommunu fáa sersømdir, men tað skulu íbúgvarnir ikki hava. Tað ber stutt og greitt ikki til at geva borgarunum, sum búgva innan fyri sonuparkeringina hjá Tórshavnar Kommunu sersømdir viðvíkjandi parkering!

Tað er undrunarvert, at slíkt, sum kann gerast í øllum øðrum stórum býum, eitt nú í Keypmannahavn, ikki skal bera til hjá okkum, men soleiðis er støðan, og her røkist einki fyri nakrari loysn.

### Gamli býurin millum vágirnar

”Gamli býurin av Vaglinum og út í Tinganes er ivaleyst best skrásetta og við byggisamtyktum best varda býarumhvørvi í Føroyum. Tinganes fekk tíðliga í tíðini tign sum tingstaður (løgting og rættarting), og við tingsetunum fylgdi eisini handilsskapur. Verulig búseting – umramt bóndagarðin – man so líðandi hava tikið seg upp í sambandi við vaksandi handilsskapin.

Fólkið í Havn, sum heild handverk-





*Tróndargøta 18, snøgt lítið svartmálað hús á hvítari grund og við hvítum vindeygum og vindskeiðum. Høgrumegin: Tekning av eyðkendum fiski- og traðarmannahúsi*